Umfatandi broytingar í SMS:

# Hanus og Janus rýkur

**Eftir ætlan verður fyrsta byggistigið av umfatandi broytingunum í SMS liðugt síðst í september. Broytingarnar merkja m.a. eitt 750 m2 stórt matstað, og so er ikki pláss fyri klædnahandlinum Hanus og Janus**

UMBYGGING
*Heri á Rógvi*

Teimum flestu kunnugt, so hendir rættiliga nógv í SMS í hesum døgum. Handlar og annað eru ikki har, tey plagdu at vera. Partar av parkeringsøkinum minnir eisini mest um byggipláss, og har er nógv at gera.

Talan er um fyrsta byggistig av tveimum, sum er sett ígongd. Miðjað verður ímóti, at fyrsta byggistigið skal vera liðugt síðst í september mánað. Tvey ár fara væntandi at ganga, áðrenn næsta byggistig verður sett í verk.

—SMS er faktiskt niðurslitið og óhóskandi til nútíðarkrøv, sigur Hans Mortensen, stjóri fyri SMS, um orsøkirnar til, at teir eru farnir undir hesar nógvu og stóru umbyggingarnar.

Tað, sum mest hevur verið at hoyrt um í sambandi við umbyggingarnar, hava verið nýggju matstovurnar, Burger King og Sunset Boulevard. Hesar eru báðar franchise matstovuketur, sum eru at finna kring allan knøttin. Hesir hava vakt ans millum manna í Føroyum, og tær fara saman við Perluni at mynda eitt 750 m2 stórt matstað, har sitipláss eru til 280 fólk. Ikki nokk við tí, men tann einstaki bilførarin fær eisini møguleikan at keypa burgarar og annað í drive-in partinum av Burger King. Hetta er ikki so vanligt í Føroyum, men kortini nógv at síggja uttanlands.

Teir nógvu fermetrarnir merkja so eisini, at klædnahandilin Hanus og Janus takkar fyri seg og fer í søguna, tí pláss verður ikki fyri honum.

Harafturímóti fær Skálkur, sum liggur beint omanfyri Hanus og Janus, meira pláss. Skálkur fer eisini at víðka um sítt úrval, soleiðis at hann eisini kemur at umfata tann eitt sindur eldra málbólkin hjá Hanusi og Janusi.

Eisini posthúsið fær nýggj hølið, sum teir longu eru byrjaðir at gera sær dælt av. Har posthúsið hevur verið, verður eitt nýtt og modernað vesi við øllum hentleikum, skulu vit heilsa og siga.

Sum heild merkir hetta fyrsta byggistigið hjá skjótt 25 ára gomlu Sølumiðstøðini, at bøtt verður mundandi um. Bygt verður vestureftir og bøtt verður eisini um nakrar av lonunum.

Onkur nýggjur handil er eisini á veg, men nøvnini á teimum eru enn læst fyri almenninginumn. Tað sama er galdandi fyri kostnaðinum av umbyggingunum.

– Vit eru eisini í holt við at endurnýggja konseptið fyri SMS, og tað fara vit eisini at hyggja nærria eftir í nærmastu framtíð, sigur Hans Mortensen.

Nógva umbyggingin fer kortini ikki at ávirka parkeringsviðurskiftini, sigur Hans.



*Eitt 750 fermetrar stórt matstað verður at finna í SMS um mánaðarskiftið september-oktober, og tað merkir m.a., at Hanus og Janus takkar fyri seg.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


*Umfatandi broytingarnar hjá SMS merkja eisini, at partar av parkeringsøkinum eru farin at líkjast einum byggiplássið. Kortini fara eingi parkeringspláss fyri skeyti*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Havnar Klubbi eykaaðalfund:

# Viðtikið partafelag


*Tað er nú eitt partafelag hjá Havnar Klubba í eigur ognirnar hjá klubbanum*

**Havnar Klubbi hevur valt at skipa eitt partafelag, sum skal eiga ognirnar hjá klubbanum**

HAVNAR KLUBBI
*Heri á Rógvi*

Lýst varð til eykaaðalfund í Havnar Klubba mikukvøldið. Á fundarskránni var umskipan av ognunum hjá felagnum.

Havnar Klubbi er eitt limafelag, men fæst nógv við at leiga høli út. Á eykaðalfundi varð samtykt, at allar ognirnar hjá felagnum skulu í framtíðini eigast av einum partafelag, sum limafelagið Havnar Klubbi sjálvt skal eiga. Tískil verður tað framvegis klubbin, sum kemur at eiga ognirnar.

– Hetta verður gjørt fyri at skipa viðurskiftini betur og skapa størri gjøgnumskygni, sigur Poul Hansen, advokatur, sum leiddi eykaaðalfundin og hevur staðið fyri stovnseta nýggja partafelagið.

Havnar Klubbi eigur bygningarnar í Klubbagarðinum við Tinghúsvegin. Talan er óivað um teir mest eftirspurdu byginingarnar í Havnini, tí teir húsa eina tveimum náttklubbum /dansistøðum, tveimum matstøðum, einari kykmyndahøll og so eisini sjálvum klubbanum. Ognirnar eru býttir yvir tvey matrikul nummør, har Havnar Bio er fyri seg.

Onkuntíð hevur talan verið um, at tikið líknandi stig, men hetta er ongantíð vorðið til veruleika.

Havnar Klubbi hevur yvir 600 limir. Á eykaaðalfundinum mikukvøldið møttu einir 75.

# Roskilde nærkast

**Mánadagin fer tónleikabólkurin Clickhaze til Danmarkar at spæla á festivalum**

TÍÐINDASKRIV

Clickhaze fer at spæla tvær konsertir afturat, áðrenn leiðin gongur til Roskilde og hinar festivalirnar í Danmark.

Hin fyrsta verður í Vestmanna, á Bryggjuni nú fríggjakvøldið kl 20.00, har Knút Eysturstein leggur fyri við kassaguitara og sangi. Hin seinna konsertin verður nú Sunnukvøldið kl. 20.00 í Losjuni í Gøtu, heimavøllinum hjá Clickhaze so at siga. Har fara Kári Sverrisson og Brian Gillingam at byrja.

Mánadagin fara Clickhaze við Atlantic Airways til Danmarkar og spæla longu mikudagin á Roskilde Festivalinum, hósdagin á Nibe Festivalinum og hósdagin 4. juli á Midtfyns Festivalinum.


*Clickhaze*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Lítil aktivitetur á basanum í Saltangará


*Støðin hjá partafelagnum, Atlantic Supply Base í Saltangará.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Menninir, sum Lassi Borðoy hevði undir sær, eru leigaðir út til Noregs, har teir arbeiða hjá CCB í Bergen**

OLJUAKTIVITETUR
*Vilmund Jacobsen*

Í longri tíð hevur lítið og einki virksemi verið við oljuútgerðarhavnina í Saltangará, men tíðliga komandi summar, tá ið AGIP fer at bora, verða útgerðarskip væntandi aftur at síggja við bryggju í Saltangará.

Tveir mans aftrat leiðaranum, Lassa Borðoy, hava verið knýttir at basanum í Saltangará, men í mai mánaði vórðu hesi leigaðir út til Noregs, har teir nú arbeiða hjá CCB í Bergen, sum er ein útgerðarhavn.

**Eingin aktivitetur**

Lassi Borðoy sigur, at í løtuni er eingin aktivitetur á økinum í Saltangará, men sjálvur fæst hann við ymiskt pappírsarbeiði, umboðan úteftir, eins og onkur ráðstevna hevur verið og er fyri framman.

Tað er føroyska partafelagið, Atlantic Supply Base, sum eigur støðina í Saltangará. 19 partaeigarar eru í felagnum, har Føroya Kolvetni er størsti eigari.

Lassi veit ikki rættiliga, hvussu verður komandi árið, nú lítil og eingin aktivitetur er á økinum.

Hann var sjómans-skúlalærari, áðrenn hann tók við starvinum hjá ASB, og møguliga fer hann at arbeiða hálva tíð hjá ASB komandi árið og undirvísa á Føroya Sjómansskúla hálva tíð.

**Viðlíkahald**

Leiðarin hjá Atlantic Supply Base hevur eisini ábyrgdina av viðlíkahaldinum í Saltangará. Nakrir tangar eru komnir upp at standa, og hetta økið í Saltangará er rættiliga farið at líkjast eini veruligari útgerðarstøð.

Hvussu verður við monnunum, sum í løtuni arbeiða hjá CCB í Bergen, veit Lassi Borðoy ikki at siga í løtuni.

- Enn vita vit ikki rættiliga, hvussu vit fara at skipa okkum á basanum, tá ið leitingin byrjar aftur í føroyskum øki, sigur Lassi Borðoy.

ASB hevur skrivstovu í bygninginum hjá P/F Beta í Saltangará.




Í morgin 22/6 hava vit opið frá kl. 11.00 til 17.00

Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi:

Upp til 15.000 kr. í avsláttri

| | | |
|---|---|---|
| Citroen Saxo 1,5D 3h reytt<br>km. 64.500, árg. jan. 2000<br>99.000,- | Citroen ZX 1,9D stc. 5h<br>km. 89.000, árg. mars 1996<br>86.000,- | Citroen Xsara 1,6i stc.<br>km. 36.000, árg. apr. 1999<br>133.000,- |
| Citroen Jumper Ch. v/last<br>km. 120.000, árg. aug. 1998<br>130.000,- | Citroen Xantia 1,9TD<br>km. 60.000, árg. feb. 1998<br>118.000,- | Mitsubishi Galant 2,0<br>km. 150.000, árg. juni 1992<br>37.000,- |
| Citroen Xsara 1,6i 5h<br>km. 30.000, árg. feb. 1998<br>107.000,- | Citroen Xantia 1,8i 16V<br>km. 63.000, árg. okt. 1996<br>112.000,- | Mitsubishi Pajero 2,8TDi GLS 5h<br>km. 40.000, árg. sept. 1998<br>185.000,- |
| Citroen Xsara 2,0 HDi 5H<br>km. 90.000, árg. nov. 1999<br>145.000,- | Citroen Saxo 1,5D 3h grátt<br>km. 25.000, árg. jan. 2001<br>116.000,- | Mitsubishi Pajero 2,8TDi GLS 5h<br>km. 82.000, árg. sept. 1997<br>177.000,- |
| Citroen Xsara 1,9TD 5H<br>árg. juni. 1999<br>137.000,- | Citroen Berlingo 1,9D<br>km. 81.000, árg. sept. 1998<br>109.000,- | Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>70.000,- |

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vælkomin til

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo